


*Andy Olsen hjá ÍF var ein hin mest eyðsýndi á vøllinum, og tvær ferðir varð brotsspark gjørt ímóti honum, tá ÍF á heimavølli vann á FC Suðuroy*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# ÍF fótaði sær aftur

**VODAFONEDEILDIN** Hóast FC Suðuroy kom á odda beinanvegin og eisini kundi økt tá, fótaði ÍF sær aftur og setti seg á dystin. Sostatt er ÍF framvegis við har frammi, samstundis sum FC Suðuroy enn hongur undir strikuni

Hilmar Jan Hansen

| | |
|---|---|
| ÍF | 3 |
| FC Suðuroy | 1 |

Mamuka Toronjadze hevur í nógvar mátar verið ein fongur fyri FC Suðuroy. Georgiski spælarin hevur gott spælskil og bjóðar av, so ofta hann fær møguleikan.

Tað vísti hann longu, tá fimm minuttir vóru farnir av dystinum í Fuglafirði í gjár, tí áðrenn fuglfirðingar høvdu sansað nakað, hevði hann lagt FC Suðuroy á odda 1-0.

Og tað kundi blivið uppaftur verri statt hjá ÍF, tí beint eftir málið høvdu suðuroyingarnir enn ein stóran møguleika, ið kundi gjørt tað til 2-0.

Framvegis vóru verri enn so allir heimaáskoðararnir komnir upp á pláss, so teir fingu sum vátan vøtt, tá teir komu í Fløtugerði og fingu at vita, at FC Suðuroy hevði lagt fyri sum eitt ódnarveður.

Tað hjálpti tó eitt sindur upp á hýrin, tá Øssur Dalbúð mitt í fyrra hálvleiki javnaði. Andy Olsen royndi seg við skoti, sum Stanislav Kuzma ikki megnaði at halda, og so var Øssur á rætta staðnum og skoraði.

### ÍF sat á øllum

Andy Olsen var yvirhøvur við í nógvum í gjár, og ikki færri enn tvær ferðir peikaði Dagfinn Olsen á brotssparksblettin, tí Andy var farin um koll.

Fyrru ferð var Frank Poulsen settur at skjóta, men tað hepnaðist ikki serliga væl hjá honum við skotinum eftir jørð, og Stanislav Kuzma bjargaði.

Aðru ferð var fimm minuttir inn í seinna hálvleik, og hesa ferð fekk Bartal Eliasen møguleikan. Hann buldraði bóltin mitt í málið, og so hevði ÍF fingið vent dystinum á máltalvuni eisini.

Eftir sjokkbyrjanina hevði ÍF sitið á tí nógva av spælinum, og nú liðið kom framum, var meira ella minni leyst og liðugt. Men sum leið út á seinna hálvleik dovnaði ÍF nakað, og tí var ein roynd gjørd at seta meira futt í.

Dánjal á Lakjuni varð skiftur inn, og hann var upprunin til triðja málið, ið avgjørdi dystin ordiliga. Í einum skjótálopi fór hann á glið, men fekk liggjandi spælt bóltin víðari til Frank Poulsen, ið skoraði trygt til 3-1, samstundis sum hann tryggjaði sær, at brenda brotssparkið í fyrra hálvleiki skjótari verður gloymt.

### Einki hekk saman

Hjá FC Suðuroy hekk einki saman, og tað eydnaðist ongantíð gestunum at hótta so mikið, at tað skakaði ÍF stórvegis, tí fuglfirðingar fingu spælt seg burtur úr tí, sum var. Av tí sama er ÍF framvegis við millum liðini, ið dystast um ovastu plássini, meðan FC Suðuroy framvegis stríðist fyri sínum tilverugrundarlagi í bestu mansdeildini.

Saknur var hesa ferð í Jón Krosslá Poulsen, ið plagar at geva álopinum hjá FC Suðuroy meira tyngd, tí hann hevði karantenu. Men hann verður klárur aftur, tá FC Suðuroy um tvær vikur skal til Havnar at spæla ímóti HB. Tá hava teir eisini vónir um, at Dan Djurhuus er klárur aftur, eftir at hann hevur verið skaddur.

## Skuldu leypa á

– Vit avtalaðu, at vit skuldu leypa á beinanvegin, og vit komu fram til tríggjar stórar kjansir, men fingu bara eitt mál. Men síðani vísti tað seg, at vit sótu ikki nóg tætt í teimum, og tá teir spældu sínar longu bóltar fram, dugdu vit ikki nóg væl at rudda burtur, sigur Henning G. Joensen hjá FC Suðuroy, ið heldur ikki var nøgdur við avrikið hjá liðnum fram eftir vøllinum.

– Einki riggaði í uppspælinum hjá okkum, so tí runnu vit fyri tað nógva aftan á teimum. Í hálvleiksteðginum vóru vit glaðir fyri støðuna, at tað stóð á jøvnum, og vit høvdu verið nøgdir, um vit bara fingu eitt stig við okkum. Men har gekk einki, og vit lógu ov langt afturi á vøllinum allan seinna hálvleik.

Henning heldur eisini, at FC Suðuroy í gjár manglaði ein, ið kundi hildið upp á bóltin og tikið ferðina úr dystinum, tí spælararnir høvdu øgiliga fáar møguleikar at spæla, tá teir fingu bóltin.

– Støðan á stigatalvuni er tó óbroytt, so vit hava trý stig upp til B71. Nú ræður so um hjá okkum at fáa skavað nøkur stig saman, áðrenn vit koma til innanhýsis dystirnar í botninum, tí vit ætla okkum at sleppa upp um B71, áðrenn tað kemur so langt, sigur Henning Joensen.